## DAGSINS MEINING

# Tann norðurlendska brúgvin

Leygardagin varð tann nýggja Norrøna sjósett í Lubeck í Týsklandi í rættiligum 80-ára stíli við hópum av føroyingum – nógvir í føroyskum búna – sum vóru fluttir til Evropeiska meginlandi á føroyskum veingjum.

Ikki kann sigast annað, enn at henda norðurlendska verkætlanin tekur seg væl og og er ein tann mest spennandi verkætlanin, fostrað er her á landi, í mong, mong ár. Ikki bara føroyingar, men íslendingar, norðmenn, danir og onnur við bíða í spenningi at sleppa umborð á norðurlendsku brúnna næsta summar.

Vit kunnu ikki siga annað, enn at Smyril Line, sum gjørdist ein rættiliga føroysk fólkaogn, hevur bygt brúgv millum Norðurlond og hevur rúmkað ræsurnar fyri norðurlendskari ferðavinnu.

Hvussu stóran týdning hon hevur havt, eru orðini hjá tveimum íslendskum ráðharrum dømi um. Teir siga, at hon skapar lív í á Eysturlandinum í Íslandi. Hon mennir íslendska ferðavinnu og útjaðaran so nógv, at bæði vegir og veitingarhús mugu byggjast. Hetta eru dømi um, at íslendingar síggja frameftir og síggja ein møguleika í ferðavinnu.

Vit skulu ikki siga, at vit í Føroyum snorksova, tí tað gera vit ikki. Summi royna – ferðaráð, kunningarstovur, gistingarhús, nakrir ferðasmiðir - men annars lyfta myndugleikarnir ikki hond frá síðu fyri av álvara at menna ferðavinnuna, so hon veruliga hevur nakað at bjóða, eisini familjum. Vit kunnu t.d. ikki bjóða ein fiskitúr ella geva fólki møguleikan at rógva á einum fjørði.

Her er munur á í Íslandi til dømis, har tilboðini ikki tróta, og har veruligir møguleikar eru at tjalda og ferðast í hús- ella tjaldvagnum, sum Norrøna leggur seg nógv eftir. Her er bara onkur hendinga kommuna, sum hevur gjørt øki til tjøld ella húsvagnar. Vit skulu sjálvandi gleðast um framstig, men okkum vantar framvegis tað stóra takið framá.

Smyril Line hevur roynt, og vónandi gera hækkandi prísir og dýr tænasta umborð ikki tað, at fólk setast aftur. Vit bíða í spenningi og ynskja Smyril Line tillukku og eydnu framá.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Hugburðsbroyting tekur tíð



**Jógvan við Keldu,**
*løgtingsmaður Fólkafloksins*

**So mangur fór skeivur, tá tað var móti at vera vinstravendur, og tann ið ikki fylgdi hesum, varð roknaður naivur**

Nú rokið hevur staðið av skeivum tíðindum frá formanninum í Uttanlandsnevndini, havi eg hugsað um viðurskiftini og víðfevndu broytingarnar, ið fram eru farnar bæði her heima og burtur í heimi, seinastu árini.

Tað eru ikki so mong ár gingin, síðani fólkið í Eysturberlin 9. november í 1989 uttan foringar gekk inn í frælsa heimin, hetta sum bert var nøkur fótafet, eftir at jarntjaldið varð slættað við jørðina. Hesin múrur sum hevði sløk 30 ár á baki, sum hevði givið so mongum deyðsstingin.

Eitt ár frammanundan hesum, og tíðina undan, gjørdi danski Javnaðarflokkurin støðuna hjá borgarligu donsku stjórnini so trupla, at sjálvt danski Nato-limaskapurin, sum tá hevði sløk fjøruti ár á baki, var í vanda. Neyðugt var við einum vali, sum borgarligi vongurin vann dyggiliga.

At Tjóðveldisflokkurin í dag er tvíbýttur í uttanríkis- og verjumálum vísir, at hann helst er komin nakað longur á leið, tí heimurin uttan um okkum er nógv broyttur.

### Helweg-Petersen og Ceausescu

Nøkur ár undan 9. november 1989, henda stóra dagin í heimssøguni, um eg ikki minnist skeivt, var rumenski leiðarin og kommunisturin Ceausescu heiðrar við »elefantordaninum«, umframt at danski radikali leiðarin Kristen Helweg-Petersen í somu tíð sendi á marknaðin bókina »Ceausescus Taler«. – Helweg-Petersen, hesin heiðursmaður.

Sama árið – jóladag í 1989 – sum Eysturberlinar gingu út í frælsa heimin, vórðu rumenski einaræðisharrin Nicolae Ceausescu og kona hansara avrættað og víst alment fram í sjónvarpi. – Tó eiga vit leggja okkum í geyma, at Ceausescu tók til máls móti Sovjet, tá teir gjørdu innrás í Prag morgunin 21. august 1968.

### Hans Kirk og Stalin

Eg fái ikki pláss í hesum viðfangi at koma inn á, tá danski kommunisturin Aksel Larsen fór úr flokkinum, tí hann mótmælti innrásini frá Sovjet inn í Budapest 1956, meðan yndishøvundurin hjá dønum og fleiri føroyingum, Hans Kirk, rósti ræðuliga leiðaranum og einaræðisharranum Stalin – sum hevði 25 milliónir mannalív uppá samvitskuna – upp um skýggini. Harafturímóti trúði hann og mong við honum lítið Solsjenitsyn og Gulag.

Eg kann troysta Tjóðveldisflokkin við, at tað eru so mong, ið eru farin skeiv, tá tað var móti, at vera vinstravendur, og tann, ið ikki var tað, segðist vera naivur.

Tjóðveldisflokkurin hevur ídag uttan iva sæð broytingarnar, men av tí, at teir í teimum døgum vóru bæði ímóti Nato og ímóti USA, sum hóast alt hava vart Evropa frá falli, skal ein tíð ganga áðrenn, tað »ber til« at viðurkenna broyttan hugburð. Vælvitandi, at tað fellir teimum ikki lætt at vera fult við Nato og USA. Tá janvaðartingmaðurin Hendrik Old hinvegin í bløðunum tosar um »stríð í samgonguni«, er hetta heldur enn ikki løgið.

Í øllum samgongum – uttan undantak – hevur verið stríð, tað er tað um allan heim. Eg kenni fólk, sum eru farin úr eini samgongu. Nøkur hava verið heppin, og eru komin aftur í samgongu, meðan onnur framvegis sita uttanfyri. - Soleiðis er lívið.

### Tjóðveldið, Nato og USA

At stríð er millum sosialistiska Tjóðveldisflokkin, ið hevur verið og lutvíst er ímóti Nato og USA, og borgarliga Fólkaflokkin, ið sær stórt í Nato og USA, hóast teir sjálvandi hava síni líti, sum vit øll onnur, sum hóast alt báðir eru sjálvstýrisflokkar, annar kanska heldur seg vera meira enn hin, tað er einki at undrast á.

Eg vil eisini siga, at tað er stríð í eini samgongu, kann eisini koma av ávísum »dynamikki«, sum kann skiljast meiri enn á ein hátt. At formaður Uttanlandsnevndarinnar Hergeir Nielsen er lopin út úr nevndini við skeivum tíðindum, líkist ongum. Tað kenna vit sum skyldu at mótmæla, men at seta hann frá, og soleiðis koma samgonguni í vanda, skal meira til.

Vit eiga at geva teimum tað tíð tað krevur at fara ígjøgnum eina hugburðsbroyting.

T e l d u p o s t u r : keldu@post.olivant.fo
H e i m a s í ð a : www.get.to/keldu

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:** Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Rúnar Reistrup runar@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Páll H. Johannesen pall@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Finnur Justinussen finnur@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Rullandi redaktionin:**
tel. 220507

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Framtaksgrunnin aftur á beint

**Blaðleiðslan á Tíðindablaðnum Sosialinum hevur heitt á meg um at skriva eina grein um viðurskifti í sambandi við Framtaksgrunnin**

**Edmund Joensen**



### Søgan í stuttum

Framtaksgrunnurin varð í 1994 settur á stovn sum ein vinnurekandi grunnur av donsku stjórnini og Føroya landsstýri í felag.

Óneyðugt er at minna á, at hetta var eitt tað ringasta kepputíðarskeiðið í nýggjari føroyskari søgu. Eitt tíðarskeið, tá álitið á føroyska búskapin var so lítið, at hvørt smáting úr útheiminum mátti gjaldast frammanundan. Vinnan á sjógvi og landi var í fríum falli. Bankakervið royndi at fóta sær eftir stóra skrallið. Vinnulívið hevði ein ómettuligan tørv á vágafúsum kapitali til fígging av rakstri og íløgum.

Landskasssin skyldaði til vinstru og høgru, løgtingsfíggjarlógin hevði fleir hundrað mió. krónur í halli, og danska stjórnin hevði átikið sær at taka øll uttanlandslánini hjá landsstýrinum (7-8 milliardir kr.) inn í statskassan.

Nýstovnaði grunnurin fekk 200 mió. krónur at ráða yvir (helvt um helvt frá Føroya landstýri og donsku stjórnini). Til at stjórna grunninum varð sett ein 5-manna nevnd.

Forsætisráðharrin og løgmaður útpeikaðu nevndalimirnar í felag, meðan tað kollegiala landstýrið formliga valdi teir allar fyri eitt 3-ára skeið.

Í praksis kunnu vit siga, at landstýrið valdi tríggjar óheftar skilamenn og stjórnin 2 serkønar nevndarlimir til at stýra grunninum.

Fyri Framtaksgrunnin vóru settir nakrir formligir karmar, sum nevndin skuldi virka innafyri. Fyri at tryggja, at nevndin helt seg innanfyri hesar karmar, var grunnurin undir eftirliti av vanligari grannskoðan, landsgrannskoðan, ríkisgrannskoðan og fíggjareftirlitinum.

Í reglunum fyri grunnin var eisini ásett, hvussu og nær virksemið skuldi aftur á privatar hendur. Alt var gjølla umhugsað og við vilja vórðu allar avgerðir fyri grunnin lagdar langt burtur frá tí politiska myndugleikanum. Hetta varð gjørt út frá vánaligu royndunum frá seinnu helvt av áttatiárunum í huga, har poltiski myndugleikin hevði innlit og ávirkan á flestu smálutir í okkara samfelag.

Alt bendir á, at tann politiska metingin, sum var gjørd frá byrjan av, var púra røtt. Eitt høvuðsendamálið var, at tilnevndir óheftir persónar við førleika skuldu hava ábyrgdina av at reka grunnin, og sjálvir taka neyðugar avgerðir, óheftir av politikkarum og øðrum.

### Landstýrið yvirtiki allan grunnin

Eitt av málunum, sum tað sokallaða "fullveldislandsstýrið" arvaði eftir sambandslandsstýrið í 1998 var uppgerðin fyri bankamálið. Við í hesi uppgerðini var eitt ynski frá donsku stjórnini um at Framtaksgrunnurin skuldi gerast føroyskur burtur av. Danska stjórnin gjørdu ikki vandari enn at hon gav føroyingum allan ráðarætt yvir grunninum.

Tá ið landstýrið hevði yvirtikið grunnin, vóru donsku serkønu nevndarlimirnir sendir til hús uppá grátt papír. Eisini teir føroysku nevndarlimirnir vórðu skiftir út og skuldu nú allir limirnir veljast á hvørjum ári. Tað hoyrist, at teir ikki aktaðu politiskur boðini. Reglurnar fyri grunnin vóru broyttar og við hesum var politiska spælið byrjað av álvara. Seinni eru nevndarlimur sjálbodnir farnir úr nevndini, og sigst orsøkin vera, at politiski roykurin gjørdist ov ramur.

Ótryggleiki valdar nú um virksemið hjá Framtaksgrunninum, Fiskavirking, Fiskasøluni o.s.f.

Tað gongur neyvan dagur, at ikki onkur søga er um skiftandi ætlanir haðani.

### Lagnunar speisemi

Framtaksgrunnurin og virksemi hansara í føroyska samfelagnum hevur verið eitt afturvendandi politiskt stríðsmál hjá nøkrum politikarum. Serliga hevur tann eini flokkurin gjørt nógv burturúr hesum, líka síðani grunnurin varð stovnaður.

Tað má tí sigast at vera lagnunar speisemi, at seinastu mánaðarnar hevur politiska handfaringin av virkseminum hjá Framtaksgrunninum, óbeinleiðis nærum tikið politiska lívið av sjálvum formanninum fyri sama flokk, nevniliga sjálvum løgmanni.

Eisini er tað undrunarvert, hvussu stórur munur er á tí, sum flestu tingmenn tá kravdu viðvíkjandi Fiskavirking, og tí sum føroyski borgarin heldur vera rætt, nú hann verður spurdur.

### Tingini uppá pláss

Løgtingið eigur nú, áðrenn skaðin gerst ov stórur, at seta tingini uppá pláss. Hetta er sera einfalt at gera. Tí heimildin, sum upprunaliga lá hjá forsætisráðharranum og løgmanni í felag, er nú hjá løgmanni eisimøllum.

Løgmaður hevur síðani latið grunnin til annan landstýrismann at umsita. Heimildin til at fara aftur til uprunaligu reglurnar eru til staðar. Løgmaður kan tá hann vil taka avgerð um, at hann sjálvur umsitur grunnin til reglurnar eru broyttar. Hann avger eisin sjálvur, nær hann vil leggja grunnin aftur til landstýrismannin, við broyttum reglum.

Eftir er so at seta í reglurar, hvussu nevnarlimirnir skulu veljast. Fyri at tryggja best møguligt, at nevndarsessirnir ikki longur eru politisk bein, men at óheft fakfólk verða vald í nevndina, kundu til dømis Arbeiðsgevararfelagið, Arbeiðarafeløgini og Fiskimannafelagið útpeikað hvør sín lim, landstýrið ein og dómarin kundi so útpeikað tann fimta nevndarlimin. Formliga velur landstýrið allar limirnar, men eftir tilmæli frá áðurnevndu instansum. Á tann hátt kundi landstýrið tryggja sær, at valdu fólkini eru óheft av politiskum flokkum og landsstýrismonnum, og at tey hava neyðuga førleikan. Nevndin kundi so skipa seg sjálva við formanni.

### Hvat verður tað næðsta?

Løgtingið eigur at seta tingini uppá pláss, og hetta má gerast áðrenn skaðin gerst upp aftur størri. Málið um Framtaksgrunnin hevur stóran prinsipiellan týdning fyri, hvat kan henda framyvir. Landstýrið eigur Fíggingargrunnin frá 92, sum er formligi eigari av Føroya Banka. Hesin er eisini ein vinnurekandi grunnur, har nevndarlimirnir eru valdir av landstýrinum á sama hátt, sum teir í framtaksgrunninum.

Politiskt er ongin munur á tí sum landstýrið longu hevur gjørt í sambandi við Framtaksgrunnin, og tí sum landstýrið kann gera í samband við Fíggingargrunnin, um hesin og bankin ikki akta politisk boð úr erva. Tað má ongantíð verða ivi um, at ein landstýrismaður ikki kann leggja trýst á tílíkar nevndir. Og roynir hann tað, eigur hann at verða settur frá uppá standandi fót.

Tí er tað sera umráðandi, at Løgtingið knæsetur siðvenju, sum ikki er til at taka feil av. T.d. skal uppspararin altíð kenna seg tryggan eins og øll fólk sum samskifta við bankan skulu kenna seg fulkomuliga trygg. Hetta kann bara Føroya løgting syrgja fyri við sínum gerðum og siðvenjum. Hetta hevur við sjálva rættartrygdina at gera, og við álitið á Føroysku skipanina í síni heild.

# Asfaltera ymsastaðni í Suðuroy

Í næsta mánað koma koma maskinurnar hjá Landsverkfrøðinginum til Suðuroyar, har ætlanin er at asfaltera ymsasataðni í Oynni, bæði uttanbíggja hjá landsverkfrøðinginum sjálvum og og innanbíggja hjá Vágs Kommunu.

Ætlanin er at asfaltera vegin Yvan Land í Vági, frá Kirkjugarðinum inn til Ósan, sum hevur verið í sera vánaligum standi.

Annars fer kommunan at asfaltera á marknoyri.

Tá ið tey arbeiðini eru gjørd, eru høvuðsvegirnir í Vági í góðum standi. Men tað trongdi eisini til, tí áðrenn farið varð undir asfalteringina í hesum umfari, hevði ongin asfaltering verið av týdningi í Vági í 14 ár, sigur Dánjal Bjarkhamar, formaður í teknisku nevnd í Býráðnum.

Hann sigur, at ætlanin er síðani at fara undir síðuvegirnar, so at allir vegirnir í Vági verða í góðum standi. Tað, sum ikki verður gjørt í ár, verður gjørt næsta ár.

Annars fer Landsverkfrøðingurin at asfaltera eitt sindur í Froðba, eitt sindur við Grótbrotið í Porkeri, eitt petti á Fámjinsvegnum og eitt sindur í Hvalba.

Arbeiðið byrjar umleið hálvan september.

